# At Fyribyrgja og Tálma Rúsevnismisnýtslu í Føroyum

## Ein Hugskotsskrá



# INNIHALDSYVIRLIT

Inngangur ... 3
Arbeiðssetningur ... 3
Arbeiðsbólkur ... 3
Rúsevnir ... 4
Rúsevnir – støðan í Føroyum ... 4
Hagtøl frá TAKS ... 4
Hagtøl frá Politinum ... 6
Barnaverndartænasturnar ... 7
Hugskot at arbeiða víðari við ... 7
Yvirskipað átøk ... 7
Átøk sum eru í gongd, og átøk sum kunnu útbyggjast ... 8
Hugskot til nýggj átøk ... 9
Samandráttur ... 11

## INNGANGUR

Í kjalarvørrinum av rúsevnismálunum, sum hava verið umrødd í Føroyum seinastu tíðina, hevur landsstýrið við løgmanni á odda gjørt av, at munadygg tiltøk skulu setast í verk til tess at basa trupulleikunum við rúsevnum millum ung.

### ARBEIÐSSETNINGUR

Landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk. Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er:

- At gera  eina hugskotsskrá yvir møgulig átøk, ið eru viðkomandi fyri at tálma nýtsluna og útbreiðsluna av rúsevnum í Føroyum.
- Arbeiðið skal gerast skjótt og er at meta sum eitt forarbeiði til eina heildarætlan um fyribyrging av rúsevnismisnýtslu í Føroyum

### ARBEIÐSBÓLKUR

Í arbeiðsbólkinum eru umboð fyri viðkomandi myndugleikar, t.v.s. Løgmansskrivstovuna, Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið og Føroya Politi. Løgmansskrivstovan samskipar arbeiðið.

Vald í arbeiðsbólkin eru niðanfyrinevndu:

- Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, fulltrúi, Løgmansskrivstovan, samskipari
- Katrin Gaard, fulltrúi, Heilsumálaráðið,
- Birta Biskopstø, tollleiðari, Fíggjarmálaráðið
- Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, Mentamálaráðið
- Poula Lervig, fulltrúi, Almannamálaráðið
- Michael Boolsen, fúti, Føroya Politi
- Eyðun Christiansen, stjóri, Kommunufelag Føroya

Harumframt hava niðanfyrinevndu luttikið á fundum í arbeiðsbólkinum:

- Steen Nørskov, chefpolitiinspektørur, Føroya Politi
- Mariann Reinert, politistur, Føroya Politi

Arbeiðsbólkurnin er biðin um at gera eitt yvirlit yvir átøk, sum arbeiðast kann víðari við. Arbeiðsbólkurin skal tí gera vart við, at talan er um hugskot til átøk, sum mugu kannast nærri og arbeiðast víðari við. Møguligt hevur ikki verið at lýsa innihaldið nærri og at meta um kostnað.

# RÚSEVNIR

## RÚSEVNIR – STØÐAN Í FØROYUM

Tað er torført at lýsa vavið á rúsevnismisnýtsluni í Føroyum, t.v.s., hvussu nógv verður innflutt av teimum ymsu sløgunum av rúsevnum, hvør nýtslan er, og hvussu nógv nýta hesi evni. Hetta kemst av, at bæði keyp, søla og nýtsla av rúsevnum eru ólóglig, og av somu orsøk fer hetta í høvuðsheitum fram í loyndum. Politiið og TAKS hava hagtøl, sum lýsa, hvat slag av rúsevnum hald verður lagt á, og í hvørjum nøgdum. Men av tí, at hagtølini einans lýsa nøgdirnar, sum Politiið og TAKS leggja hald á, er ilt at siga, hvør innflutningurin í veruleikanum er. Talan kann tí harumframt vera um eitt myrkatal, sum myndugleikarnir ikki kenna til. Hagtølini kunnu tó geva eina ábending um, hvørji rúsevni verða innflutt.

### HAGTØL FRÁ TAKS

TAKS hevur sambært tolllógini eftirlit við øllum inn- og útflutningi av vørum, herundir eisini av kontantum peningi.

Tolldeildin skal við sjónligum marknaeftirliti verja Føroyar ímóti ólógligum innflutningi av vørum, rúsevnum, heilivági, vápnum og smittuberandi evnum, ið kunnu vera fólki og fæi at meini.

*Talva 1: Rúsevnaeftirlit av ferðafólkum*




Av tí, at rúsevni eru ein ólóglig vøra, verða tey smuglað til Føroyar. Smuglingarhættirnir eru margfaldir og verða býttir í tveir høvuðspartar: persónsflutningur og frakt. Persónsflutningur snýr seg um persónar, sum smugla rúsevni við sær í land, tá teir koma til Føroyar við flogfari ella skipi. Talan er um rúsevni í viðføri ella innvortis. Rúsevni verða eisini send til Føroyar sum frakt við antin skipi ella við flogfari.

Talva 1 vísir talið av rúsevniseftirlitum, sum TAKS hevur havt í árunum 2018-2020, meðan talva 2 vísir nøgdir av rúsevnum, sum TAKS hevur lagt hald á somu ár.

*Talva 2: Nøgdir av rúsevnum, sum TAKS hevur lagt hald á í 2018 – 2020*

| Rúsevni/ár | 2018 | 2019 | 2020 (higartil) |
|---|---|---|---|
| Hash | 8.662 gr. | 18.165 gr. | 2.643 gr. |
| Amfetamin | 216 gr. | 983 gr. | 0 gr. |
| Cocain | 2 gr. | 49 gr. | 40 gr. |
| MDMD | 44 gr. | 44 gr. | 4 gr. |
| Frímerkir (LSD) | 178 stk. | 520 stk. | 0 stk. |

**Persónar, sum smugla innvortis (Body Packers):**

- 2020 vóru 7 persónar kannaðir í røntgen (2 persónar høvdu)
- 2019 vóru 6 persónar í røntgen (6 persónar høvdu)
- 2018 vóru 9 persónar í røntgen (6 persónar høvdu)

**Persónar, sum eru tiknir útgangandi til eftirlit við pengum:**

TAKS sær, at persónar koma og geva pengar upp við fráferð. Illgruni er um hvítvasking av pengum, tá ið ferðafólkini ikki hava eina fullgóða frágreiðing ella skjalfesting, um hvar peningurin stavar frá. Tolldeildin hevur fingið atgongd til fráboðanarskipanina hjá Anklagemyndigheden. Fráboðanir um illgruna um hvítvasking av peningi fara umvegis hesa skipan.

- 2020 vóru 3 persónar tiknir til útgangandi eftirlit. 6.000 USD, 97.745 EUR, 111.200 DKK
- 2019 vóru 4 persónar tiknir til útgangandi eftirlit. 47.750 dkk tilsamans
- 2018 var 1 persónur tiknir til útgangandi eftirlit. 50.300 dkk tilsamans.

2020 hevur á mangan hátt verið eitt serligt ár. Ferðafólkatalið sjóvegis og loftvegis er lækkað við uml. 50 %. Fraktin og posturin hevur verið áleið tað sama sum undanfarin ár. Í 2021 er væntandi, at ferðafólkatalið bæði sjóvegis og loftvegis fer at vaksa.

## HAGTØL FRÁ POLITINUM

Í talvu 3 er eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar persónar, sum Politiið antin hevur skuldsett ella mistonkt í sambandi við brot á lógina um euforiserandi evni í tíðarskeiðnum 2012 – 2020 (higartil). Sum tað sæst í talvu 3 sveiggja tølini innan ymsu bólkarnar nakað ár undan ári. 2020 hevur tó verið serligt við nógvum ymiskum avmarkingum, sum kann hava ávirka tølini jaliga. Ansast skal tí eftir at gera eina niðurstøðu viðvíkjandi 2020. Vert er at leggja til merkis, at tollvaldið við útgangandi eftirliti hevur lagt hald á stórar peningaupphæddir í 2020. Hetta kann tala fyri, at tað eru rúsevni, sum eru flutt til Føroya, uttan at politi og tollvald hava varnast tí.

*Talva 3: Yvirlit yvir tal á skuldsettum ella mistonktum*

| Antal | | | Anmeldt årtal | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GKODE | Rolle | Sagstype | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Hovedtotal |
| 71281 | Sigtet | Salg af narkotika (Strl.) | | 2 | | 1 | | | | | 7 | 10 |
| 71282 | Sigtet | Smugling m.v. af narkotika (Strl.) | | | | 4 | 5 | 3 | 5 | 9 | 1 | 27 |
| 83988 | Mistænkt | Narko-undersøgelser | | | | | | | 1 | | | 1 |
| | Sigtet | Narko-undersøgelser | | | | 1 | | | | | | 1 |
| 84110 | Mistænkt | Lov. om Euf. | | | | 1 | | | | | | 1 |
| | Sigtet | Lov. om Euf. | 1 | 17 | 12 | 39 | 54 | 77 | 72 | 104 | 90 | 466 |
| 84111 | Sigtet | Lov. om Euf. (salg) | 3 | 10 | 5 | 19 | 37 | 34 | 17 | 19 | 30 | 174 |
| **Hovedtotal** | | | **4** | **29** | **17** | **65** | **96** | **114** | **95** | **132** | **128** | **680** |

Tabel 7: Kilde Niflheimr, politiets journalsystem. Dataperioden alene tilgængelig i årene 2012-2020 (pr. 1.12.20)

Í talvu 3 sæst eitt yvirlit yvir, hvussu nógv eru skuldsett ella mistonkt í 6 ávísum bólkum viðvíkjandi euforiserandi evnum. Í talvuni sæst eisini, hvussu nógv av hesum eru í aldrinum 15 – 24 ár. Sambært talvuni eru helvtin af teimum, sum antin eru skuldsett ella mistonkt í sambandi við brot á lov om euforisernde stoffer, persónar í aldrinum 15 – 24 ár. Somuleiðis vísir talvan, at sera fáir persónar í hesum aldursbólki eru skuldsettir ella mistonktir fyri at selja ella smugla narkotika.

*Talva 4: Yvirlit yvir tal á skuldsettum ella mistonktum býtt á aldur*



## BARNAVERNDARTÆNASTURNAR

Barnaverndartænasturnar síggja ikki eitt rák, at ung stríðast meira við rúsevni í dag enn fyrr. Tað hevur tó altíð verið tíðarskeið, har tað íkoma fleiri mál um somu tíð, og ofta er tá talan um ávíst øki í landinum. Barnaverndartænasturnar taka hetta í størsta álvara og arbeiða saman við øðrum myndugleikum á økinum fyri at hjálpa teimum ungu og familjum teirra. Bólkurin ung yvir 18 ár, har tað møguliga eru fleiri, ið misnýta rúsevni, er tó ikki málbókur hjá barnaverndartænastunum.

## HUGSKOT AT ARBEIÐA VÍÐARI VIÐ

Tað eru fjøltáttaðar, torgreiddar og víðfevndar orsøkir til, at summi ung velja at rúsa seg við m.a. rúsevnum. Av somu orsøk er eisini tørvur á fjøltáttaðum átaksøkjum til tess at kunna loysa ella minka um hesar trupulleikar.

Fleiri ymiskir myndugleikar og skipanir virka eisini á rúsøkinum, og spurningurin er, hvussu man fremur samstarv millum hesar, soleiðis at orkan verður nýtt á bestan hátt.

Politiið, sum er ein myndugleiki, sum virkar á rúsøkinum, hevur gjørt greitt, at besti mátin at tálma nýtsluna av rúsevnum í Føroyum er við at fyribyrgja, at nakar byrjar at nýta rúsevni. Hetta metir politiið best verður gjørt við breiðum átøkum millum ymisk øki og myndugleikar sum til dømis almannaøkið, heilsuøkið og skúlaøkið.

Niðanfyri er ein hugskotsskrá, sum er eitt yvirlit yvir yvirskipað átøk, sum longu eru sett í verk, og kunnu útbyggjast og átøk, sum arbeiðast kann víðari við fyri at tálma nýtsluna og útbreiðsluna av rúsevnum í Føroyum. Av tí at skotbráið er so stutt, ber ikki til at gera eina nærri lýsing av innihaldi og kostnaði av átøkunum. Talan er um hugskot, sum tað er neyðugt at arbeiða víðari við.

## YVIRSKIPAÐ ÁTØK

**Felagsátak**

- Útbygging av vitanargrundarlagi viðvíkjandi nýtslu og útbreiðslu av rúsevnum í Føroyum
- Heildarætlan viðvíkjandi fyribyrging av rúsevnismisnýtslu í Føroyum
- Hvussu kann man fáa ymsu skipanirnar á rúsøkinum til at arbeiða betri saman, soleiðis at færri detta ímillum skipanir

**Felagsátak millum Færøernes Politi og Tollvaldi**

- Politi og tollvald hava eitt týðandi og tætt samstarv sum heldur fram.

**Felags átak á økinum hjá Færøernes Politi, Almannamálaráðnum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum og kommunurnar**

- SSP samstarvið, sum fevnir um børn og ung í aldursbólkin 0 - 18 ár, heldur fram. Fyribyrging av lógarbrotum, myndugleikasamskipan og heildarvegleiðing er høvuðsmálið við SSP samstarvinum.

**Átøk á økinum hjá Heilsumálaráðnum**

- Ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 og 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Lógargrundarlagið er uppá pláss, men skipanin er ikki byrjað enn. Talan er um eina 3 ára royndarskipan
- Fólkaheilsuráðið hevur gjørt faldarar til børn/ung og foreldur um rúsdrekka og rúsevni. Ymist tilfar liggur á heimasíðuni
- ABC fyri sálarliga heilsu heldur fram
- Nýtt tiltak fyri ung, “Kveik Ung”, sum skal læra ung, hvussu tey kunnu ansa eftir og betra um sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum, sínum vinum og javnaldrum
- Styrkja foreldraførleikan serliga hjá veikum familjum gjøgnum Gigni (Klar til barn)

**Átøk á økinum hjá Almannamálaráðnum**

- Megna títt lív, sum er eitt átak, sum hevur til endamáls at lofta ungum við umfatandi og samansettum sálarligum og sosialum avbjóðingum og rúsevnistrupulleikum
- Stuðul er givin til telefonráðgeving hjá Barnabata til børn og ung, soleiðis at hesi kunnu geva til kennar sína stúran, at tosa við onnur um støður, ið ávirka tey, samstundis sum tey fáa hjálp og vegleiðing. Í hesum sambandi eisini í mun til avbjóðingar við rúsdrekka og rúsevnum
- Almannamálaráðið roynir mið- og stigvíst at víðka um tænastur, bú- og viðgerðartilboð og varandi bútilboð, sum eru ætlaðar til at stuðla persónum, sum hava sálarligar og sosialar trupulleikar at dragast við, í at hava ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag soleiðis, at hesi velja rúsevni, og kriminalitet frá
- Í trivnaðareind 10 verður arbeitt við eini ætlan um at veita børnum og ungum, ið eru innskrivaði á samdøgursstovn, viðgerð, ið er málrættað teimum, ið – umframt aðrar avbjóðingar – eisini hava ella eru í vanda fyri at fáa rúsdrekka- og rúsevnistrupulleikar

- Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk gevur Almannaverkinum heimild at hjálpa  ungum at fóta sær á arbeiðsmarknaðinum. Lógin hevur til endamáls at hjálpa teimum, sum hava trupult at fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin m.a. orsakað av sosialum og sálarligum forðingum. Almannaverkið kann hjálpa teimum ungu í arbeiðsvenjing á vanliga arbeiðsmarknaðinum og veita stuðul í sambandi við útbúgvingar. Eisini er heimild at veita stuðul til leiðbeinaraskipan og sálarfrøðiliga hjálp í royndini at fáa ung á arbeiðsmarknaðin, sum hava sálarligar og sosialar avbjóðingar.

**Átøk á økinum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum**

- Í fólkaskúlanum verður áherðsla løgd á bæði upplýsing um rúsevni og fyribyrging við átøkum at skapa trivnað og felagsskap fyri tann einstaka og fyri skúlaflokkin sum heild og næmingabólkar.
- Flokslærarin virkar fyri trivnaði í einstaka flokkinum og hevur skyldu til at boða foreldrum frá, um hann er varur við, at barn teirra mistrívist ella hevur trupulleikar í skúlanum.
- Undirvísing og kunning um rúsevni verður endurskoðað, serliga við atliti at, at ítøkilig námsætlan vantar  í kravda undirvísingarevninum heilsukunnleika, sum m.a fatar um rúsevni.
- SSP lærarar eru settir í skúlunumm. Teir virka saman við førleikastovunum og í økisbólkunum. Arbeitt verður bæði fyribyrgjandi og at veita hjálp og kunning í serstøkum málum innan SSP arbeiðið. Stig verða tikin til uppfylgjandi kunning um rúsevni og heilsuligu og sálarligu árinini.
- Stig eru tikin til at styrkja vegleiðingina í skúlunum í sambandi við trivnaðararbeiði. Trivnaðarráðgevi  er settur frá 1. november 2020.

## HUGSKOT TIL NÝGGJ ÁTØK

**Felags átak á økinum hjá Færøernes Politi, Almannamálaráðnum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum og kommunurnar**

- Víðkað SSP samstarv (SSP+) til eisini at fevna um aldursbólkin av ungum í aldrinum 18-24 ár, har  fyribyrging og myndugleikasamskipan er høvuðsmálið.

**Átøk á økinum hjá Kriminalforsorgini**

- Kriminalforsorgin ynskir at blíva partur av SSP+ samstarvinum

**Felags átak á økinum hjá Færøernes Politi, Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum**

- Politiið samskiftir við Almannaráðið og Heilsumálaráðið, um sonevnt PSP samstarv (politi, social sektor, psykiatri). Fleiri sum misnýta rúsevni hava sálarligar avbjóðingar og sálarligar sjúkur. Tilboðið minnir annars um SSP+ samstarvið.

**Felags átøk á økinum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum**

- Skipa sterkar og mennandi felagsskapir fyri børn og ung – serliga ætlað teimum børnum og ungum, sum ikki luttaka í ítrótti ella ikki klára seg væl í skúlanum

**Felagsátak á økinum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum og kommununum**

- Fleiri tilboð í ungdómshúsum, har tannáringar luttaka í mennandi felagsskapi

**Átøk á økinum hjá Løgmansskrivstovuni**

- Tryggja, at viðgerðartrygd og heimild fyri alternativa siting av revsing verður við í nýggja revsifulnaðarlógini fyri Føroyar
- Arbeiða víðari við at fáa fongsul í Føroyum

**Átøk á økinum hjá Fíggjarmálaráðnum**

- Tørvur er á skipanum, sum TAKS kann nýta í samband við greining av fraktini.
- Tørvur er á skipanum, sum TAKS kann nýta í samband við greining av postinum

**Átøk á økinum hjá Heilsumálaráðnum**

- Fleiri heilsufrøðingar á skúlunum
- Tryggja at børn, sum hava brúk fyri hjálp, fáa neyðugu hjálpina
- Rúsevnisviðgerðartilboð eigur at setast í verk fyri persónar yngri enn 18 ár
- Skipa eitt tilboð, sum kann hjálpa ungum, tá tey eru liðug við rúsevnisviðgerð
- Skipa mentorskipan fyri ung, tá tey eru liðug við rúsevnisviðgerð

**Átøk á økinum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum**

- Regluligar kanningar av trivnaði í skúlunum
- Uppfylging av trivnaðarátøkum, ið eru sett í verk í skúlunum

## SAMANDRÁTTUR

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eitt yvirlit yvir átøk, sum arbeiðast kann víðari við.

Sum yvirskipað átøk mælir arbeiðsbólkurin fyrst og fremst til, at vitanargrundarlagið fyri nýtslu og útbreiðslu av rúsevnum í Føroyum verður víðka. Síðan verður mælt til at ein heildarætlan um fyribyrging og tálming av rúsevnismisnýtsla í Føroyum verður gjørd.

Ein tílík heildarætlan kundi verið gjørd av einum arbeiðsbólki, samansettur av umboðum frá hesum ráðum:

- Løgmansskrivstovuni
- Heilsumálaráðnum
- Almannamálaráðnum
- Uttanríkis- og mentamálaráðnum
- Fíggjarmálaráðnum

Arbeiðsbólkurin kundi so innkallað allar áhugabólkar inn til ummælisfundir og útfrá hesum gjørt eina neyvari ætlan.